Nú skulu ítróttarleikarar á skúlabonk

ÍSF er farið í samstarv við Handilsskúlan um skeið í nevndararbeiði og persónligari menning

Nú hava leiðarar í ítróttarfeløgunum kring landið møguleika at koma á skúlabonk fyri at læra, hvussu tey kunnu gerast betri til at røkja uppgávuna, sum tey hava átikið sær í lokala felagnum ella í einum sersambandi.

ÍSF boðaði longu á aðalfundinum seinast frá, at teir arbeiddu við at skipa fyri samstarvi við Handilsskúlan, og nú er komið so mikið langt við hesum, at skeiðini verða lýst.

Talan er um eitt skeið, sum verður hildið kring landið. Skeiðið er sekstan tímar, og tað verður hildið í tveir dagar – fýra tímar hvønn dagin. Kostnaðurin er hundrað krónur fyri hvønn luttakaran, og tá er íroknað undirvísing, skeiðtilfar og matur. Sagt verður, at boðast skal frá luttøku í seinasta lagi 17. mars hjá skeiðtænastu Handilsskúlans, sum hevur telefon 17177.

Í Handilsskúlanum í Kambsdali verður skeiðið leygardagin 18. og sunnudagin 19. apríl frá kl. 9 til 17, í Havnini verður tað týsdagin 14., hósdagin 16., týsdagin 21. og hósdagin 23. apríl – allar dagarnar frá kl. 16 til 20 í Handilsskúlanum, á Tvøroyri verður skeiðið í skúlanum leygardagin 2. og sunnudagin 3. mai frá kl. 9 til 17, í Klaksvík verður skeiðið leygardagin 9. og sunnudagin 10. mai frá kl. 9 til 17, og í Sørvági verður skeiðið vikuskiftið 23. og 24. mai í skúlanum.

Innihald

Endamálið við skeiðnum er, at luttakararnir fáa kunnleika um ymsar arbeiðs- og samarbeiðshættir, ið kunnu nýtast í dagliga arbeiðnum til menning av felagnum og til sjálvsmenning. Skeiðið ætlast at hjálpa luttakarunum at gerast betur førir fyri at taka ímóti og arbeiða við upplýsingum, orða og geva upplýsingar víðari, sum aftur skal hava við sær, at trygdin verður størri fyri einum hægri kunningarstøði.

Yvirskriftirnar fyri tí, sum verður á skeiðnum, eru fyriskipan, fundarleiðsla, roknskapur og kreativitetur.

Sagt verður, at tað krevst eingin forkunnleiki fyri at taka lut á skeiðnum. Frálæran verður gjørd livandi, og dentur verður lagdur á, at luttakararnir eru virknir og ikki bara skulu sita og lurta, verður sagt frá fyrireikarunum.

Arbeiði

Hvussu kann eg vita hvat eg vil
hvussu kann eg gera tað við vit og skil

Hvussu kann eg finna út av
um eg skal smíða ella sigla tað salta hav

Skal man hyggja í eina bók
ella skal tað takast sum ein joke

Ella skal man bara út í luftina hyggja
ella siga nøkur mergja orð fyri landið at byggja

Ella skal man út í nøkur ár fyri okkurt at uppliva
enn at spilla nøkur ár tí man situr í iva

Ella skal man út í verðina at fjakka
ella arbeiða fyri einum skattalætta

Skal man kanska blíva missionerur
og tosa um allar anda verur

Ella skal man fara á internetið
ella fara á Fróðskaparsetrið

Kanska skal man nógv ganga í skúla
ella liva sum ein løgin kúla

Ella kanska skal man siga nú er friður
og seta seg sum bónda í Múla niður

Ella kanska bara fáa sín feita arv
og liva lívið feitt uttan starv

Eina útbúgving at hava er aldrin býtt
men valið verður altíð títt!!!!

10.A á Venjingarskúlanum

Lesarabrøv

Øll kristin trúarsamfeløg vóru ikki spurd

Sambært fjølmiðlunum hava menn í sambandi við ætlaða 1000-árahaldið fyri kristnitøkuna í Føroyum spurt øll kristin trúarsamfeløg, um tey ynsktu at vera við. Bert brøðrasamkoman vildi ikki vera við. At øll kristin trúarsamfeløg vórðu spurd, er kortini ikki satt. Hóast góð 60 ár eru liðin, síðan Jehova Vitni fyrstu ferð byrjaðu at boða her í landinum, verða tey eyðsæð ikki mett sum kristin. Tey vórðu í hvussu er ikki spurd. Ikki at vit eru firtin um tað ella fegin vilja sleppa upp í part. Svar okkara hevði kortini verið eitt nei. Partvís halda vit sum brøðrasamkoman ikki, tað ber til at kristna eitt heilt land í senn, partvís tykist framferðarhátturin fyri 1000 árum síðani okkum ikki at vera í samsvar við Bíbliuna.

Tá Føroya bispur í fjølmiðlunum sigur, at *øll* kristin trúarsamfeløg, uttan brøðrasamkoman, hava sagt ja, kann onkur skilja tað, sum Jehova Vitni eisini skulu vera við í 1000-árahaldinum. Tað ynskja vit við hesum at avsanna. Annars undrast vit kanska eisini á, at Sigmundur Brestison, sum ferðaðist kring oyggjarnar við svørði í hond, verður mettur sum kristin, meðan Jehova Vitni, ið koma við Bíbliuni í hond, ikki roknast sum kristin. Tá Jehova vitni boða hús úr húsi, er tað, tí eingin annar enn Jesus Kristus sjálvur beyð okkum at gera tað. (Matt. 24:14; 28:19, 20) Alt tað, Jehova Vitni trúgva, og lív teirra sum heild, tekur støði í fyrimyndini hjá teimum fyrstu kristnu, soleiðis sum vit lesa um í Nýggja Testamenti.

Vinarlig heilsan,

Tíðindatænastan hjá Jehova Vitnum í Føroyum

Svar til lesarabræv frá Eiko Apol um ferðatrygging

Í Sosialinum 29.1.98 biður Eiko Apol um nakrar nágreiniligari upplýsingar um ferðatrygging saman við nøkrum viðmerkingum um almenna sjúkratrygging hjá okkum og londunum kring okkum.

Í fleiri londum er sjúkrakassaskipanin avloyst av »Den offentlige Sygesikring« har viðtiknar lógir áseta hvørjar útreiðslur verða goldnar. Í Norðurlondunum er Danmark **einasta** landið, har tað er álagt **øllum** landsins borgarum at rinda fyri tey, sum á frítíðarferð í Evropa og fáa brúk fyri sjúkraviðgerð, sjúkrahúsuppihaldi ella skulu flytast heimaftur. Fyri fáum árum var skipanin galdandi fyri frítíðraferðir upp í 60 dagar, men seinni stytt til 30 dagar. Á hvørjum ári er spurningurin frammi um at taka skipanina av.

Føroyar eru sostatt í somu støðu sum hini Norðurlondini, á ferðum suðuri í Evropa nevnilig: Tey ferðandi mugu antin sjálv rinda sjúkraviðgerð og heimflutningsútreiðslur ella býta útreiðslurnar sínámillum gjøgnum tryggingarfelag. So gott sum øll velja ferðatryggingina, tí tey vita, at tá illa veit við, er talan um einstakar rokningar millum kr. 50.000,- og 200.000,- í evropeiskum øki.

Hvussu stór endurgjøldini vóru í 1995 frá donsku tryggingarfeløgunum til teirra viðskiftafólk, er okkum ókunnugt.

Ferðatryggingartreytir og prísir verða regluliga endurskoðað bæði her og aðrastaðni. Síðani stóru broytingarnar hjá okkum í 1994/95 eru prísirnir t.d. fyri ferðir til Onglands og Allan Heimin lækkaðir og tryggingarhæddirnar fyri viðføri á Trygg Bilferð tryggingini eru hækkaðar uttan meirkostnað.

Vit vita, at um ársskiftið eru stórar broytingar gjørdar í donsku ferðatryggingunum. Teir hava millum annað strikað lágprístryggingarnar nevndar »budget« tí fleiri av tryggingarupphæddunum vóru ov smáar til at gjalda allan skaðan hjá viðskiftafólkunum.

Hesum vistu vit av í 1994/95, og valdu tí **ikki** at taka lágprístryggingarnar við í okkara úrval. Tað skuldi heldur ikki verið neydugt, tá prísirnir her eru lægri enn »plus« tryggingarnar í Danmark, **tá sama vøra við somu skyldum verður samanborin.**

Dygd kostar

Spurt verður um vit sum einasta ferðatryggingarfelag her á landi lata eina rímiliga tænastu á hesum øki. Av tí at tað neyvan er rætt av okkum at svara hesum spurningi, verður í staðin upplýst: Vit hava sett okkum sum mál, at føroysku ferðatryggingar altíð skulu umfata alt tað felagini kring okkum bjóða teirra viðskiftafólkum. Umframt skulu tryggingar leggja upp fyri **serliga tørvinum** ferðandi úr Føroyum til eina og hvørja tíð hava.

Her kundu vit nevnt alt tað, sum starvsfólkini á ferðamannastovunum á hvørjum ári fáa gjøgnumgingið á okkara skeiðum. Óivað fer hetta at fylla ov nógv her, og loyva vit okkum at vísa til ferðafaldararnar, sum nágreiniliga vísa á munirnar til frama fyri ferðandi úr Føroyum. Víst verður eisini til starvsfólkini á ferðamannastovunum og okkara egnu avgreiðslum.

Nú so nógv er skrivað um rættindi og skyldur á ferðum, fara vit at gera vart við/minna á, at vit kunnu koam verri fyri á ferð Í Danmark enn hinum Norðurlondunum. Í Danmark hava vit á ferð bert rætt til bráðfeingis læknahjálp og innlegging á sjúkrahús. Verður tað dýrari enn vanliga ferðaseðilin at flyta okkum heim aftur, mugu vit sjálvi rinda eykakostnaðin, um eingin ferðatrygging er at rinda.

Vinarliga,

Tryggingarsambandið Føroyar
Kjartan Dalsgaard,
marknaðarleiðari

Lesarabrøv

Eitt hjartasuff

Í blaðnum hevur verið nakað gjørt burtur úr umhvørvi og hvussu reint tað er vorðið í teimum ymsu kommununum. Harafturat hevur IRF eisini meldað út, hvussu nógv summar kommunur gera fyri umhvørvi. Teir megna ikki at brenna alt ruski sum kemur inn.

Í Sosialinum frá 23/1 stóð aftur ein grein um umhvørvi og um hvussu nógv verður gjørt í teimum ymsu kommununum fyri, at tað skal verða so reint og ruddiligt sum gjørligt.

Eg búgvi í Skála kommunu inni á Skálafirði. Sum øllum kunnugt, so liggja 5 kommunur við Skálafjørðin, við einum fólkatali uppá áleið 2500-3000. (Hettar er bert eitt met).

Tað nógva av tí ruski, sum kemur frá hesum fólkum og teimum skipum, sum sigla inn og út av fjørðinum, verður tveitt á sjógv uttan at kommunurnar gera nóg mikið, fyri at forða hesum.

Alt tað sum flýtur so sum plastikk, plastdunkar og annað rekur so inn á sandin í Skálafirði til miklan ampa hjá okkum, sum búgva í hesi bygd. Í vindi liggur alt og fýkur runt í bygdini og endar inn ímillum húsini og í bøin, sum er avtakin í plastikk, tundrum, dunkum øðrum.

Sandurin varð ruddaður millum jól og nýggjár, av bygdarfólkinum. Tað gingu bert 3 dagar við lágætt, so var sandurin aftur avtikin av ruski.

Tað hevði verið sera gott, um tit høvdu vilja tikið ruskspurningin runt Skálafjørðin upp í blaðið tykkara og viðgjørt hann. Bygdarfólki hevur heitt bæði á okkara egnu kommunu og á Kongshavnar Havn um at fáa greiði á hesum, fyri okkum so týðandi máli, men tað er sum at sláa í stein, einki verður gjørt.

Tit skuldu ómakað tykkum ein túr inn á sandin í Skálafirði, so høvdu tit sæð alla óhumskuna sum liggur á sandinum og langt norður í bøin.

Tað er so vælsignað lætt, at sita út i á Argjum í eini fjálgari skrivstovu við eini teldu framman fyri sær og skriva tað niður, sum kemur einum fyri oyra.

Vinarliga
Almfinn Jacobsen